## Býráðsfundur mánadagin 30. januar 2012 kl. 19.30.

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, , Svenn Olsen, Jan Erlingsson Petersen, Steintór Jacobsen, Fríðgerð Heinesen, Hans Mourits Foldbo og Tollakur Joensen

**Ikki á fundi:** Páll Isholm

**Fundurin lokin kl. 23.00**

**Fundarskrá:**

**1. 12/00023**
**Keyp av Limmilund**
Hagastýrið fyri ognarhagan í Leirvík, ynskir at selja Eysturkommunu økið, sum Limmilindin liggur á. Ognarhagin ynskir at selja fyri 70% av marknaðarprísinum, sum í dag er kr. 89 fyri m². Øki, sum talan er um er 15.133 m².

Tilmæli frá føstu nevndunum fyriliggur

**Fundarsamtykt:**

Tollakur Joensen skjýtur upp at ein heildarætlan fyri tílík økir verður gjørd, áðrenn støða verður tikin í málinum.

Hanna Jensen skjýtur upp at umsitingin fær heimild til at samráðast við eigarnar um ein prís við keyp fyri eyga.

Fyrst varð atkvøtt um uppskoti hjá Tollaki Joensen og atkvøtt varð soleiðis:

**Atkvøður fyri:**
Steintór Jacobsen
Tollakur Joensen
Svenn Olsen

**Atkvøður ímóti:**
Jóhan Christiansen
Hanna Jensen
Fríðgerð Heinesen
Jan E. Petersen
Hans Mourits Foldbo
Við tí viðmerking at tey taka undir við at ein heildarætlan verður gjørd, men skal ikki tvinnast saman við hesum málinum

Síðani var atkvøtt um uppskotið hjá Hannu Jensen.

**Atkvøður fyri:**
Jóhan Christiansen
Hanna Jensen
Fríðgerð Heinesen
Jan E. Petersen
Hans Mourits Foldbo
Steintór Jacobsen
Svenn Olsen

**Býráðsfundur mánadagin 30. januar 2012 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, , Svenn Olsen, Jan Erlingsson Petersen, Steintór Jacobsen, Fríðgerð Heinesen, Hans Mourits Foldbo og Tollakur Joensen

**Ikki á fundi:** Páll Isholm

**Fundurin lokin kl. 23.00**

**Atkvøður blankt:**
Tollakur Joensen

Sostatt er uppskoti samtykt.

**2.** **11/00141**
**Móttøkuhøll og spilloljuverk hjá IRF**
Í sambandi við viðgerðini av hesum málinum vísa útgreiningar av framleiðsluni og móttøku av kemikalium, at sløkkiliðið skal hava naka av eykaútgerð m.a. kemikaliudraktir, skúm, útgerð til reinsipunkt (desinfisering/reinsast í).

Sambært L.L. nr. 78 frá 12. juni 1986 kann áleggjast virkinum at útvega hesa útgerð ið er mett til 25.000,00 – 200.000,00 kr.

IRF vil hava svar frá Eysturkommunu, um kommunan ber henda kostnaðin.

Tekniska nevnd mælir til at IRF ber eykakostnaðin fyri sløkkiútgerð ið er treyta av móttøkuhøllini og spilloljuverkinum.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum teknisku nevnd.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**3.** **12/00045**
**Góðkenning av roknskapi hjá bókasavninum**
Grannskoðaður roknskapur fyriliggur til fundin.

Samtykt at góðkenna fyriliggjandi roknskap

**Atkvøður fyri**
Jóhan Christiansen
Hanna Jensen
Fríðgerð Heinesen
Jan E. Petersen
Hans Mourits Foldbo
Steintór Jacobsen
Svenn Olsen

**Býráðsfundur mánadagin 30. januar 2012 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, , Svenn Olsen, Jan Erlingsson Petersen, Steintór Jacobsen, Fríðgerð Heinesen, Hans Mourits Foldbo og Tollakur Joensen

**Ikki á fundi:** Páll Isholm

**Fundurin lokin kl. 23.00**

**Atkvøður blankt:**
Tollakur Joensen

**4. 09/00158**

**Leigusáttmáli um brandstøð**

Verandi leigusáttmáli um barandstøðina er útgingin tann 1. januar 2012. Útleigarin (Sp/F Mitttún) er sinnaður at leingja verandi sáttmála í 2 ár.

Fíggjarnevndin mælir til at leingja sáttmálan verandi sáttmála til 1. januar 2014.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini

**5. 11/00112**

**Leiga/selja undirlendi til neystini á havnalagnum á Toftanesi í Leirvík**

Býráðið samtykt tann 28. februar 2010 at undirlendi verður leiga.

Í sáttmálunum sum eru gjørdir stendur einki áramál og at hann (sáttmálin) er uttan kostanð fyri leigaran. Inlendismálaráðið hevur boðað frá at hetta kann ikki gíoðtakast. Í sáttmálanum skal ein leigukostnaður verða ásettur og tíðarskeiðið kann í mesta lagi verða 30 ár.

Fíggjarnevndin mælir til at tíðarskeiðið fyri leigusáttmálanar verðru 30 ár, og at leigukostnaðurin 16,50 kr. fyri $m^2$ um árið.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**6. 12/00038**

**Mannagongdir og prísir fyri leigu av bataplássi í bátahylinum á Toftanesi**

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við fyriliggjandi uppskoti frá bygginevndini.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**7. 09/00363**

**Bygginevnd til Sarpugerði**

Møguligt val av nýggjari nevnd.

Samtykt at velja nevndina av nýggjum og at hesi verða vald í nevndina, Hanna Jensen, Jóhan Christiansen og Jan E. Petersen og at Hans Mourits Foldbo verður varalimur.

## Býráðsfundur mánadagin 30. januar 2012 kl. 19.30.

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, , Svenn Olsen, Jan Erlingsson Petersen, Steintór Jacobsen, Fríðgerð Heinesen, Hans Mourits Foldbo og Tollakur Joensen

**Ikki á fundi:** Páll Isholm

## Fundurin lokin kl. 23.00

**Atkvøður fyri**
Jóhan Christiansen
Hanna Jensen
Fríðgerð Heinesen
Jan E. Petersen
Hans Mourits Foldbo
Steintór Jacobsen
Svenn Olsen

**Atkvøður blankt:**
Tollakur Joensen

**8.** **12/00039**
**Keyp/leiga av bygningi til býráðshús og umsitingina**
Tilmæli frá fíggjarnevndini fyriliggur

*Málið verður viðgjørt fyri afturlætnum hurðum*

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**Eysturkommunu býráð:**

Jóhan Christiansen ______________________________

Svenn Olsen ______________________________

Hanna Jensen ______________________________

Tollakur Joensen ______________________________

Jan Erlingsson Petersen ______________________________

Steintór Jacobsen ______________________________

Fríðgerð Heinesen ______________________________

Hans Mourits Foldbo ______________________________